

Mynd: National Geographic

# Túrurin er í uppskoti sum ársins ævintýr

National Geographic hevur Leven Brown, stigtakara og skipara, og túrin hjá Artemis Investments í uppskoti sum ársins ævintýr í 2010.

Leven Brown var skipari á Artemis Investments. Hann hevði sett sær fyri at rógva tvørtur um Atlantshavið. Málið var at gerast skjótasti árabátur tvørtur um Atlantshavið. Hann setti seg í samband við Livar í januar í fjør, tí hann vildi fegin hava rógvaran við í hópin. Don Lennox og Ray Carroll, sum eru millum heimsins bestu rógvarar, tóku eisini av tilboðnum.

Tað ber til at atkvøða fyri Leven Brown á heimasíðuni hjá National Geographic. Endaliga úrslitið verður avdúkað 11. februar.



# Dokumentarfilmur varpar ljós á Livar og Føroyar

**Susan Gatti, leikstjóri, fer í næstum at varpa ljós á havrógving og túrin hjá Livari Nysted og manningini umborð á Artemis Investments í dokumentarfilmi. Ein slíkur filmur varpar eisini ljós á Føroyar, sigur Livar Nysted**

Uni Holm Johannesen

Livar Nysted er bilsin, men samstundis fegin.

Susan Gatti, amerikansk leikstjóri, fer at seta sjóneykuna á havrógving í einum komandi dokumentarfilmi. Filmurin fer mest at snúgva seg um túrin hjá Livari Nysted og hinum umborð á Artemis Investments tvørtur um Atlantshavið.

- Ein slíkur filmur varpar ljós á Føroyar. Tað er stuttligt, heldur Livar Nysted, sum tosaði við leikstjóran umvegis telefon í gjár.

### Heimsmetið

Eftir slakar 44 dagar í viðráki og mótráki um Atlantshavið í bátinum Artemis Investments, fingu Livar Nysted, Don Lennox, Leven Brown og Ray Carroll aftur fast undir fótum í St. Mary í Scilly Oyggjunum í summar. Báturin var skjótasti árabátur um Atlantshavið nakrantíð. Gamla metið áttu tveir norðmenn, sum nýttu gott og væl 55 dagar um teinin fyri 114 árum síðan.

Túrurin vakti ans í altjóða miðlum. BBC Bretland, The Guardian og aðrir miðlar skrivaðu nógv um nýggja heimsmetið.

Susan Gatti hevur drúgvar royndir sum leikstjóri. Hon hevur verið í vinnuni í gott og væl 20 ár. Hon hevur staðið á odda fyri fleiri ymiskum og væl umtóktum dokumentarfilmum, sum tó ikki hava funnið vegin til Føroya.

Gatti prátaði við Livar og hinar framman fyri snurrandi myndatólum undan og eftir ferðini í summar. Samrøðurnar skulu eisini brúkast í filminum.

- Eg hevði sjálvur eitt upptøkutól við, og eg fekk fleiri feskar upptøkur. Mínar myndir eru eitt sindur øðrvísi, og Susan Gatti vil fegin hava tær við í filminum eisini, greiðir Livar frá.

Yvirskipaða evnið í dokumentarfilminum er havrógving, men túrurin hjá Artemis Investments eigur stóran leiklut.

Livar Nysted veit ikki stórvegis annað at siga um innihaldið í verkætlanini. Tað er ikki greitt, nær filmurin verður liðugur, og manningin, sum róð um Atlanshavið, fær neyvan stórvegis vinning burturúr.

- Tað snýr seg heldur ikki um pengar. Tað er ikki hvønn dag, at tínar upplivingar verða partur av einum dokumentarfilmi, sigur Livar.

### Komin fyri seg

Tað eru seks mánaðir síðan, at Artemis Investments kom í land, og Livar Nysted vendi aftur til Føroya og heimbygdina Hvannasund.

Hann er komin fyri seg aftaná drúgva túrin, og hann vísir ikki aftur, at hann fer ein slíkan túr aftur.

- Eg havi ongar ítøkiligar ætlanir, men eg kundi væl hugsað mær at farið slíkan túr aftur, sigur Livar Nysted.

Har við vísir hann ikki aftur, at hansara upplivingar á sjógnum møguliga verða partur av fleiri dokumentarfilmum.



# Eingin umbering frá Javnaðarflokkinum

**John Johannesen, politiskur formaður í Javnaðarflokkinum, heldur ikki, at tað er nøkur orsøk at siga orsaka við Gerhard Lognberg**

Uni Holm Johannesen

Almenna eftirlýsingin, har Javnaðarflokkurin bað Gerhard Lognberg koma til arbeiðis, heldur enn at finnast at flokkinum og floksfeløgunum í fjølmiðlunum, hevur fingið nógva umrøðu.

John Johannesen er politiskur formaður í Javnaðarflokkinum. Hann harmast um, at tað ber ongantíð til at seta seg niður at kjakast um ymisk viðurskifti og føra síni sjónarmið fram, heldur enn at skjóta eftir floksfeløgunum í fjølmiðlunum.

Tí er eingin orsøk at siga orsaka við Gerhard Lognberg, sigur hann við Rás2.